## Grønland og USA avtala samband

Umboð fyri grønlendskar og amerikanskar myndugleikar skrivaðu í gjár undir eina avtalu um vinnuligt samband loftvegis og sjóvegis millum Grønland og USA. Avtalan er tann fyrsta landanna millum og er fingin í lag ígjøgnum ta serligu Joint Committee fyri USA, Grønland og Danmark. Per Berthelsen, landsstýrismaður í uttanríkismálum, sigur við KNR, at avtalan fer at styrkja tað búskaparliga sambandið millum USA og Grønland og hevur til endamáls at skapa framburð í økinum.

## 7. Fíggjarleiðari settur á Flogvøllinum

P/F Vága Floghavn hevur sett Regin I. Jakobsen í starv sum fíggjarleiðara Regin er útbúgvin HD í roknskapi og hevur prógv sum cand.merc.aud. Hann hevur arbeitt sum grannskoðari, sum fíggjar- og fyrisitingarleiðari og sum búskaparleiðari og umsitingarstjóri í peningastovnum. Regin, ið er 42 ár og búsitandi í Tórshavn, byrjar í starvinum beinanvegin.

# at hita



*- Tað fyrsta, vit mugu gera, er at seta reglugerð í gildi við krøvum um, hvussu vit skulu byggja okkara hús, sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur á almennum kjakfundi hjá Tjóðveldi í Miðlahúsinum í gjárkvøldið. Her situr hann vinstrumegin. Undir liðini á honum stendur Jóannes Hansen, orðstýrari og síðani er tað Jørn Astrup Hansen, formaður í búskaparráðnum, Sonja Jógvansdóttir í Samtaki og Marita Rasmussen í Vinnuhúsinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Magni Laksáfoss undrast á, at vit ikki hava krøv til bjálving, tí tað er eitt sjálvsagt stað at seta reglar í verk.

### Hava góðar møguleikar

- Tað mest positiva er, at vit hava stórar møguleikar at minka um oljunýtsluna, samstundis sum vit hava góðar møguleikar at leggja um til varandi orku, tí á nógvum økjum finst tøknin longu.

- Serliga er tað sjálvsagt at brúka vindorku at hita hús við, tí tað er nógvur vindur um veturin og tá er samstundis mest brúk fyri hita.

Men tað fyrsta, vit eiga at gera, er at seta eina byggireglugerð í gildi, sum setir krøv til bygging og isolering, tá ið vit byggja.

Samstundis eiga vit eisini at leggja eina landsætlan fyri bygging, har tað verður ásett, hvar búsetingar skulu vera og, hvussu vit skulu byggja.

Skulu vit framvegis hava hvør síni sethús, ella um vit skulu fara yvir til íbúðarbygging, sum er munandi meiri orkusparandi.

Magni Laksáfoss sigur, at vit eiga at leggja mvg stuðulin til sethúsabygging um til ein stuðul til bjálvingarstuðul til, ella til stuðul til at leggja um til varandi orku, so at tað verður lættari hjá fólki at leggja um.

- Tøknin til alt hetta er longu til staðar, so tað er bara at fara til verka, segði Magni Laksáfoss.

# Burtur frá oljuni áðrenn hon er uppi

**Í dag brúka vit tvær ferðir so nógva olju, sum vit finna og vit mugu seta okkum sum mát, at sleppa okkum burtur frá oljuni, áðrenn hon fer burtur frá okkum, sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur**

OLJUNÝTSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Støðan er so álvarslig at vit verða noydd til at taka støðu til, hvussu okkara livistøðið skal verða í framtíðini.

Tað var ein boðskapur frá Magna Laksáfoss, búskaparfrøðingi, á almennum kjakfundi hjá Tjóðveldinum í einum stúgvandi fullum Miðlahúsi í gjárkvøldið.

Magni Laksáfoss legði fleiri daprar spádómar fyri áhoyrararnar um gongdina í prísinum og nýtsluni av olju tey næstu árini.

Hann nevndi, at nógvir stovnar uttanlands, sum hava fingurin mitt á oljupulsinum, hava gjørt nógvar frágreiðingar um oljunýtsluna og metingar um framtíðina.

- Orkustovnurin hjá OECD hevur gjørt greitt, at ein vakran dag er oljan uppi og vit eiga at fara burtur frá oljuni, áðrenn hon fer burtur frá okkum.

- Tað eigur at verða okkara herróp, tí við at granska og menna aðrar orkukeldur, eiga vit at sleppa okkum burtur frá oljuni.

Samstundis sleppa vit ikki undan at eiga at taka støðu til, hvussu livistøðið skal vera í framtíðini og, hvussu samfelagið skal skipast.

### Brúka meiri enn vit finna

Magni Laksáfoss nevndi eisini, at fleiri frágreiðingar frá stovnum og feløgum við olju sum serfrøði, hava við olju at gera, hava akkurát somu niðurstøðu.

- Enntá oljufeløgini sjálvi siga tað sama, tí tey hava víst á, at í dag brúka vit tvær ferðir so nógva olju, sum vit finna.

Magni Laksáfoss staðfestir, at tá ið vit brúka meiri olju enn vit finna, kann tað ikki merkja annað, enn at oljuframleiðslan fer at minka fyrr ella seinni.

- Hetta er ikki ein meting. Hetta er tann nakni veruleiki, legði hann afturat.

Hann sigur, at spurningurin er so, nær hetta fer at henda.

- Øll eru samd um, at tað er longu nú, ella í ringasta føri í allarnærmastu framtíð, at hetta fer at henda.

- Og ein professari í jarðfrøði hevur staðfest, at hetta fer at fáa ávirkan á fleiri menniskju í fleiri londum á fleiri hættir enn nakað annað, vit áður hava upplivað í søgu heimsins.

- So álvarslig er støðan, sambært serfrøðingum, sigur Magni Laksáfoss.

### Prísurin rýkur upp aftur

Hann vísti á, at í seinastuni er oljan blivin bíligari, men tað er fyrst og fremst takkað verið fíggjarkreppuni, sum herjar allan heimin.

- Men tað sigur seg sjálvt, at táið eftirspurningurin er størri enn framleiðslan, fer tað at trýsta prísin uppeftir.

Rákið hevur verið at oljuprísurin er hækkaður so nógv, at tað hevur ført til, at stígur kemur í búskapin og tað er hetta, sum er hent nú.

- Tað var orkutrupulleikin, sum prikaði hol á bløðruna og tað hevur ført til, at oljuprísurin er kavaður á botn aftur.

Men Magni Laksáfoss staðfestir, at tá ið tær ringu tíðirnar eru av, fer oljuprísurin at hækka aftur við rúkandi ferð.

- Sostatt koma vit at skifta ímillum eina fíggjarkreppu og eina orkukreppu, legði hann afturat.

Hann vísti til ein politikara í Avstralia, sum staðfesti, at ongin ynskir sær stóra skuld, tá ið karusellin steðgar.

- Ein stór skuld er nakað, sum bara kann handfarast í einum samfelag við stórum búskaparvøkstri. Orsøkin til, at vit hava havt búskaparvøkstur, er bara tann, at vit hava havt atgongd til ríkiligt av ótrúliga bíligari olju.

- Táið oljan steðgar, steðgar búskaparvøksturin og tá steðga eisini møguleikarnar at handfara skuld.

- Sostatt mugu vit staðfesta, at stór skuld og fallandi oljuframleiðsla ganga illa hond í hond og tað er akkurát hetta, vit uppliva nú á døgum.

Spurningurin er so, hvussu álvarslig støðan er.

Í hesum sambandi vísti Magni Laksáfoss til ein guvernør í Kolorado í USA, sum long í 2006 segði, at tað frægasta, hann sá fyri sær, er ein heimsumfatandi kreppa og samstarva vit ikki, kann tað lættliga enda við kríggi, hunguri, sjúku og deyða, sum hjá teimum fýra reiðmonnunum í opinberingini.

# Grøn orka til tað almenna

Á kjakfundinum í Miðlahúsinum í gjárkvøldið, saknaði Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, eina miðvísa ætlan at leggja allar almennar bygningar um til varandi orku og til at seta orkusparandi tiltøk í verk.

- Tað almenna eigur eisini at bjálva almennar bygningar betri og alt Tinganes átti at fingið hita úr sjónum og tað ber væl til við tøkni, vit hava í dag.

Ístaðin fyri at seta oljufýr í nýggja fiskivinnuskúlan í Vestmanna, átti at hann at verðið hitaður vð sjóvarhita.

- Eg haldi, at tað almenna eigur at seta 150 milliónir av um árið til at bjálva almennar bygningar meiri og at leggja um til varandi orku, segði Magni Laksáfoss.

## Neyvan kaðal millum Føroyar og Ísland

Á kjakfundinum í Miðlahúsinum í gjárkvøldið varð eisini nomið við ætlanina at leggja kaðal úr Føroyum til Íslands og keypa orku haðani.

Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, staðfesti, at hann hevði ikki hugsað so nógv um tann møguleikan.

Men hann segði, at tað er ein sannroynd, at orka verður dýrari og dýrari um allan heimin og tí gera heimsins lond nógv burtur úr at flyta orkukrevjandi framleiðslur til lond við bíligari orku.

Tí er sannlíkt at orkan í Íslandi eisini fer at verða dýrari í framtíðini, tí eftirspurningurin fer at veksa nógv tey næstu árini.

Men skulu vit tosa um orkusparing, vísti hann á, at hava fiskifrøðingar rætt í, at vit kunnu fiska somu nøgd av fiski við einum flota, sum er nógv minni, er tað heilt sjálvsagt at seta tiltøk í verk á hesum øki og at minka fiskiflotan, tí hann brúkar helvtina av allari oljuni hjá føroyingum.